Útbúgvingar á Setrinum 2020

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Okkara Setur er *títt* Setur

Chik Collins
Rektari

Tá mær stóð í boði at gerast rektari á Fróðskaparsetri Føroya í 2019, tók eg av. Í Setrinum sá eg eina merkisverda søgu um vøkstur, menning og íkast til føroyska samfelagið. Eg vildi bjóða mær sjálvum av á nýggjan hátt og gerast partur av hesari merkisverdu søguni.

Eg vóni, at tit eins og eg síggja og trúgva upp á teir mongu avbera góðu møguleikarnar fyri hægri lestri á Setrinum hjá okkum, og at tit taka av tí tilboðnum, sum er tað rætta fyri tykkum.

Møguleiki er fyri at lesa føroyskt mál og mentan, náttúruvísindi, kunningartøkni og verkfrøði, søgu og samfelagsvísindi, búskaparfrøði og løgfrøði, læraraútbúgving og námsfrøði, sjúkrarøktarfrøði og almenna heilsu, skapandi list, umframt fleiri aðrar útbúgvingingar.

Kanska vilt tú vera fulltíðarlesandi ella parttíðarlesandi, bachelorlesandi ella masterlesandi, lesandi í holt við heila útbúgving ella stakgreinalesandi.

Kanska ert tú ein nýklakt pisa úr miðnámi ella eitt tilkomið fólk, sum ætlar at taka eina hægri útbúgving á fyrsta sinni ella at skoyta upp í útbúgvingina, sum tú longu hevur.

Kanska miðar tú eftir eini ávísari starvsleið ella strembar eftir vitanini sjálvari fyri hennara egnu skuld.

Vit bjóða tykkum *øllum* hjartaliga vælkomnum.

Og uttan mun til, *hvat* tit velja at lesa, ella *hvussu* tit velja at lesa, verða tit bjóðað av – og styðjað – til at vaksa og mennast á nýggjan hátt og at vinna tykkum nýggja vitan og verkligar førleikar. Tú fert at uppliva ta ómetaligu stóru ávirkanina, sum hægri lestur hevur á teg sum einstakling, tíni framtíðarútlit og títt íkast til umheimin.

Tú verður harumframt partur av einum serstøkum fróðskaparsetri við einum altjóða sjónarringi, sum tó setur tørvin hjá Føroya fólki og okkara grannatjóðum í miðdepil.

Okkara Fróðskaparsetur er ikki einans Setrið *hjá* Føroyum, men Setrið *fyri* Føroyar. Tað er *okkara* Setur, og tú kanst søkja inn og gera tað til *títt* Setur!

Tak av og latið okkum vaksa í felag – verð partur av *okkara* merkisverdu søgu!

Bachelor – er tað ikki ein gamal drongur?

Akademiska verðin er yðjandi full av útbúgvingar- og starvsheitum, ið kunnu fáa ein, sum ikki kennir tey enn, at føla seg ótryggan. Men fall ikki í fátt. Her eru nakrar av frágreiðingunum, og fløkist tú í heitunum, spyr so – eingir spurningar eru býttir

Bachelorútbúgvingarnar hava ymisk heiti.
BA er bachelorheiti í hugvísindum og er stytting fyri Bachelor of Arts.
BSSc er bachelorheiti í samfelagsvísindum og er stytting fyri Bachelor of Social Science.
BSc er bachelorheiti í náttúruvísindum og er stytting fyri Bachelor of Science.
BEd er bachelorheiti í námsvísindum, bæði fyri lærara- og námsfrøðingaútbúgvingina, og er stytting fyri Bachelor of Education. Lesturin tekur fýra ár og er skipaður í tveimum stigum. Fyrst trý ár fyri at gerast Bachelor of Education, og síðani eitt ár, sum gevur yrkisførleika til lærara ella námsfrøðing.

Masterútbúgvingarnar, sum byggja á bachelor, hava somuleiðis ymisk heiti.
MA er masterheiti í hugvísindum og er stytting fyri Master of Arts.
MSSc er masterheiti í samfelagsvísindum og er stytting fyri Master of Social Science.
MSc er masterheiti í náttúruvísindum og er stytting fyri Master of Science.

Hjánám
Summar útbúgvingar kunnu takast sum hjánám, sum á enskum kallast “Subsidiary Subject Studies”. Hjánám er viðkomandi, tá ein vil hava útbúgving, sum er sett saman av tveimum fakum. Hjá teimum, sum t.d. vilja verða lærarar í miðnámsskúlum, kann tað vera ein fyrimunur, men eingin treyt, at hava tvær lærugreinir at undirvísa. Onnur lærugreinin skal vera høvuðsnám og hin hjánám.

ECTS – hvat er so tað?
ECTS er ein altjóða stigskipan, sum er gjørd á tann hátt, at fulltíðarlesnaður í eitt ár telur 60 ECTS-stig. Stigini eru sostatt mát fyri, hvussu stór tann ásetta arbeiðsbyrðan er fyri eina ávísa útbúgving ella skeið. Í europeiskum høpi merkir tað, at ein fulltíðarlesandi væntandi hevur millum 1500 og 1800 tímar í arbeiðsbyrðu eitt lestrarár fyri at kunna røkka málunum fyri útbúgvingini.

Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktaravísindi
7 BSc í sjúkrarøktarafrøði
8 MSc í heilsuvísindum

Føroyamálsdeildin
11 BA í føroyskum
12 MA í føroyskum
13 Hjánám í føroyskum
14 Diplomútbúgving í listarligum arbeiði

Námsvísindadeildin
17 BEd sum fólkaskúlalærari
18 BEd sum námsfrøðingur
19 B.Ed. ískoytisútbúgving

Náttúruvísindadeildin
23 BSc í KT-verkfrøði
24 BSc í lívfrøði
25 BSc í mýlalívsvísindum
26 BSc í maskinfrøði
27 BSc í orkuverkfrøði
28 BSc í orkuvísindum og støddfrøði
29 BSc í orkuvísindum
30 Hjánám í støddfrøði

Søgu- og samfelagsdeildin
33 BSc í búskaparfrøði og virkisfrøði
34 BSSc í politikki og umsiting
35 BSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging
36 BA í søgu (smátjóðir og altjóðagerð)
37 MSSc í politikki og umsiting
38 MA í søgu
39 MSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging
40 Hjánám í samfelagsvísindum
41 BL í løgfrøði
42 MA í løgfrøði

Borgarar við góðari heilsu eru dýrasta ogn, eitt land kann hava

– Winston Churchill

Magni Mohr er dekanur á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi

BSc í sjúkrarøktarfrøði

Við útbúgvingini kanst tú virka sum sjúkrarøktarfrøðingur og vera við í fakligum og tvørfakligum samarbeiði. Útbúgvingin gevur ástøðiligan og kliniskan kunnleika í samsvari við vísindaligu, tøkniligu og samfelagsligu menningina og tørvin innan sjúkrarøkt

Útbúgvingin fevnir um ástøðiliga undirvísing á Setrinum, umframt kliniska undirvísing á sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum, viðgerðar- og fyribyrgingarstovnum, í heimatænastuni og í venjingarstovu á Setrinum. Samanlagt telur ástøðiliga undirvísingin 2½ ár av útbúgvingini og kliniska undirvísingin 1½ ár. Útbúgvingin endar við einari ritgerð.

Upptøkutreytir:

Treyt fyri upptøku er bókligt (gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við nóg góðum miðalprótvali.
Um miðalprótvalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.
Prógv í fyrstuhjálp, ikki eldri enn 3 ár við lestrarbyrjan, er treyt.

Framtíðarmøguleikar

Við útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur frá Setrinum ert tú væl búgvin til arbeiðsmarknaðin. Tú fært førleika at røkta sjúk fólk í øllum aldri og lívsstøðum. Eisini fært tú førleika at fyribyrgja sjúku og fremja heilsu. Útbúgvingin gevur eisini atgongd til víðari lestur í sjúkrarøkt og á øðrum økjum.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til lestrarvegleiðaran á deildini, Johild Dulavík, johildd@setur.fo ella útbúgvingarleiðaran, Annemi Lund Joensen, annemij@setur.fo

Lestrartíð: 4 ár (240 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 30
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MSc í heilsuvísindum

Endamálið við útbúgvingini er at geva almanna- og heilsustarvsfólki í primera og sekundera geiranum førleikar at greina og menna egið fakøki og førleikar at seta í verk granskingarverkætlanir, ella gerast partur av størri granskingarverkætlanum

Heilsuvísindi umfata og viðgera heilsu og umsorgan í einum tvørfakligum perspektivi, har dentur verður lagdur á tørvin hjá einstaka menniskjanum til at endurvinna ella varðveita heilsu.
Megingreinirnar eru vísindaástøði, háttalagsfrøði og heilsugransking, samfelagsviðurskifti og heilsa, fyribyrging og heilsuframi. Dentur verður lagdur á tvørfakligheit og spurdómsrættaðar tilgongdir, umframt kritiska støðutakan.
Við valfríum eindum kann tann lesandi skapa sær sín egna fakliga profil, til dømis í fólkaheilsu, kliniskari sjúkrarøkt, sosialari heilsu ella meiri fakspesifikk øki sum rehabilitering, gerontologi, psykiatri o.a.
Útbúgvingin endar við einari ritgerð.

Upptøkutreytir

Umsøkjarar skulu hava miðallanga útbúgving sum bachelor ella professiónsbachelor, eitt nú í sjúkrarøktarfrøði, ljósmóðir, námsfrøði, lærarayrki, sosialráðgeving, ergoterapi, fysioterapi, samfelagsfrøði ella bioanalysu.
Nærri meting verður gjørd í hvørjum einstøkum føri.

Framtíðarmøguleikar

Útbúgvingin gevur førleikar til støv í primera og sekundera geiranum, sum krevja greinandi, fakligan førleika á masterstigi, t.d. leiðandi støv við serligum atliti at menning og samskipan av heilsutiltøkum innan heilsuøkið, almannaverkið, starvsfólkamenning og menning av heilsu- og almannaverkinum sum útbúgvingarstað.
Við hesi útbúgving mennist tann lesandi eisini til víðari lestur á ph.d.-stigi.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Ásu Róin, útbúgvingarleiðara á telduposti asar@setur.fo ella á tlf. nr. 292254.

Lestrartíð: 2 ár / 4 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 30
Gevur rætt til stuðul: Ja (2 ár) / nei (4 ár)

Lesið meira um útbúgvingina her

Lat okkum ala fram tey kvinnuligu orðini, sum skjóta gróðurin í gongd

– Rannvá Holm Mortenen, 2018

Málið dettur ikki sundur, um vit hanga saman

– Tóroddur Poulsen, 1997

Bergur D. Hansen er dekanur á Føroyamálsdeildini

BA í føroyskum

Útbúgvingin gevur spennandi starvsmøguleikar, har hollur kunnleiki til móðurmál og bókmentir er neyðugur, t.d. í miðlaheiminum, á forløgum, í fyrisiting, á granskingarstovnum og í undirvísing

Málsligi parturin av útbúgvingini er samansettur av málsøguligum og samtíðarligum skeiðum, har dentur verður lagdur á málsøgu, málbygnað og sammeting við onnur norðurlendsk mál.
Í tí bókmentaliga partinum lærir tú um ymisk tíðarskeið í bókmentasøguni við at lesa eldri og yngri tekstir og at greina bókmentaligar tekstir við støði í vísindaligum háttaløgum og ástøðum. Tú fært innlit í hugsjónarlig rák og ognar tær førleika at nýta hóskandi vísindalig hugtøk.
Umframt málsligar og bókmentaligar lærugreinir fært tú skeið í vísindaástøði og samskifti og fjølmiðlum, og útbúgvingin endar við einari ritgerð.

Upptøkutreytir

Umsøkjarar skulu hava bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við í minsta lagi 5,8 í føroyskum eftir 7-talsstiganum ella 8 eftir 13-talsstiganum. Um miðalprótvalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Útbúgvingin gevur fjøltáttaðar og spennandi arbeiðsmøguleikar á økjum, har góðir málsligir førleikar og innlit í bókmentasøgu eru neyðug, t.d. í miðlunum, á forløgum, í fyrisiting, á granskingarstovnum og í undirvísing. Við BA-prógvi í føroyskum kanst tú søkja um upptøku á MA í føroyskum og taka aðrar útbúgvingar innan málsliga og bókmentaliga økið.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Zakaris Svabo Hansen, útbúgvingarleiðara á zakarish@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 25
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MA í føroyskum

Útbúgvingin gevur kunnleika á høgum akademiskum stigi í vísindaligum lærugreinum í føroyskum. Studenturin mennir síni evni til kritiska støðutakan og sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði

Áherðsla verður løgd á dýpdarkunnleika um føroyskt mál og bókmentir. Harumframt verður dentur lagdur á at menna førleikar at nýta viðkomandi vísindalig hugtøk, háttaløg og ástøði kritiskt.
MA í føroyskum er 120 ECTS. 80 eru frá lestrarevnum, har ið tann lesandi velur millum tey evni, sum eru í boði, ella kann seta saman sjálvlestrarevni. Endað verður við eini MA-ritgerð og fyrilestri, ið telja 40 ECTS. Til ber eisini at taka samansett MA. Í samansettum MA kann føroyskt antin vera høvuðsgrein ella hjánám. Les meira um hjánám á næstu síðu.

Upptøkutreytir
Studentur, sum hevur lokið BA-prógv í føroyskum við í minsta lagi 5,8 eftir 7-tals-stiganum ella 8 í miðal eftir 13-talstiganum, kann søkja um upptøku á MA-námi. Umsøkjarar við góðum BA-prógvi í øðrum málum og bókmentum kunnu verða tiknir inn eftir hóskandi treytum, sum verða ásettar nærri í hvørjum einstøkum føri.

Framtíðarmøguleikar
MA í føroyskum máli og bókmentum er útbúgving, sum gevur undirvísingarførleika í føroyskum á miðnámsskúlum og hægri skúlum. Eisini gevur útbúgvingin góðan førleika at starvast í eitt nú fjølmiðlum, á forløgum, sum týðarar og málsligir ráðgevar. Lokið MA-prógv við góðum úrsliti gevur møguleika at fara undir ph.d.-nám.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Zakaris Svabo Hansen, útbúgvingarleiðara, zakarish@setur.fo.

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: Øll, ið lúka upptøkukrøvini
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

Hjánám í føroyskum

Endamálið við útbúgvingini er m.a. at útbúgva studentin í at vera lærari í miðnámsskúlum. Hjánámið gevur vitan og innlit í føroyskt mál og føroyskar bókmentir samtíðarliga og søguliga

Tann málsligi parturin er samansettur av mál-søguligum og samtíðarligum skeiðum, har dentur verður lagdur á málsøgu, málbygnað og sammeting við onnur norðurlendsk mál. Í tí bókmentaliga partinum lærir tú um ymisk tíðarskeið í bókmentasøguni við at lesa eldri og yngri tekstir og at greina bókmentaligar tekstir við støði í vísindaligum háttaløgum og ástøðum. Tú fært innlit í hugsjónarlig rák og ognar tær førleika at nýta hóskandi vísindalig hugtøk.
Umframt málsligar og bókmentaligar lærugreinir fært tú skeið í vísindaástøði, samskifti og fjølmiðlum.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er, at umsøkjarin hevur staðið ella er innskrivaður til eitt høvuðsnám, umframt at viðkomandi hevur staðið føroyskt á A-stigi við í minsta lagi 5,8 eftir 7-talsstiganum ella 8 eftir 13-talsstiganum.

Framtíðarmøguleikar
Hjánám í føroyskum gevur saman við eini høvuðsgrein møguleika at arbeiða sum miðnámsskúlalærari. Harumframt eru góðir starvsmøguleikar á økjum, har kunnleiki til móðurmál og bókmentir er neyðugur, t.d. innan miðlar og fyrisiting.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Zakaris Svabo Hansen, útbúgvingarleiðara, zakarish@setur.fo.

Lestrartíð: 1½ ár (90 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 10
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

Diplomútbúgving í listaligum arbeiði

Upptøka verður í 2021

Studenturin ognar sær verkligan førleika til sjálvstøðugt listaligt arbeiði og fær ástøðiliga vitan til at hugsa greinandi um list og egna skapanargongd

Útbúgvingin er 2/3 verklig og 1/3 ástøðilig og er býtt í tvær listaligar leiðir, ritlist og tónlist.
Í verkstovunum á tónlistaleiðini verður undirvíst í nótalæru, ljómfrøði, tónasmíð, útseting, tónleikatøkni og øðrum viðkomandi evnum. Á ritlistaleiðini verður undirvíst í eitt nú narratologi, frásagnarhættum, stíllegum, neyvlesing, ymiskum sløgum av teksti og skriving umframt týðing.
Í fakinum Egið arbeiði fáa studentarnir høvi at menna ein sjálvstøðugan listaligan samleika. Bólka- og einstaklingaundirvísing eru karmur um greining og kjak av verkum hjá studentunum sjálvum. Studenturin mennir førleikan at fyrihalda seg kritiskt til egið listaligt virki og at geva øðrum grundaðan kritikk.
Ástøðiligi parturin fevnir um fyrilestrar og náms-skeið í fagurfrøði, bókmentum, bókmentafrøði, tónleikasøgu og tónleikafrøði. Sum studentur fært tú innlit í samanhangir, sum treyta og mynda tína yrkislistagrein, og lærir um ástøði, sum geva tær førleika at hugsa greinandi um list úr skiftandi sjónarhornum.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv. Verður søkt eftir kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting. Umframt hesar treytir er upptøka eisini treytað av, at egið arbeiði verður latið inn, sum staðfestir nøktandi listaligan førleika í annaðhvørt ritlist ella tónlist. Umsøkjarar skulu harumframt lata inn eina síðu, sum í stuttum lýsir teirra listaliga profil. Fyri hvørja leið metir ein upptøkunevnd við trimum limum um innkomna tilfarið.

Framtíðarmøguleikar

Prógvið gevur grundarlag fyri sjálvstøðugum listaligum arbeiði, har ein í stóran mun myndar sína egnu yrkisleið. Eftir lokna útbúgving ber til at søkja inn á annan lærdan háskúla ella tónlistaskúla at fáa BA-prógv. Um viðkomandi lærustovnur góðskrivar ECTS-stig, sum eru vunnin aðrastaðni, veitir Fróðskaparsetrið trygd fyri stigunum, sum eru vunnin í sambandi við diplomútbúgvingina.

Nærri kunning fæst við at venda sær til list@setur.fo.

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 15
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

Tú kennir góða undirvísing lættliga aftur í tí, at hon vekur í tær eina kenslu, ið sigur tær okkurt, sum tú altíð hevur vitað

– Frank Herbert

Erla Olsen er dekanur á Námsvísindadeildini

BEd sum fólkaskúlalærari

Við hesi útbúgvingini verður tú fólkaskúlalærari við førleika til at fyrireika, fremja, eftirmeta, menna og skjalprógva undirvísingargongdir á øllum floksstigum

Grundskeiðini fevna um námsfrøðiliga sálarfrøði, námsfrøði og almennan didaktikk, føroyskt og støddfrøði.
Linjulesturin fevnir um lærugreinirnar í føroyska fólkaskúlanum, t.d. føroyskt, danskt, enskt, týskt, kristni, søgu, samfelagsfrøði, lívfrøði, landalæru, alis- og evnafrøði, støddfrøði, myndlist, handarbeiði, smíð, heimkunnleika, ítrótt, tónleik, náttúru og tøkni og kunningartøkni.
Eisini eru felags linjur ímillum námsfrøðinga- og læraralesandi: innskúling og at vera skúlabúgvin, sernámsfrøði og námsfrøðilig leiðsla og fyrisiting.
Til ber at lesa partar av lestrinum uttanlands. Hetta kann gerast í triðja ella fjórða lestrarári, tá ið linjulesturin er á skránni.
Partur av útbúgvingartíðini er skipað sum starvslæra í fólkaskúlum.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv. Neyðugt er við góðum føroyskum málførleika fyri at megna útbúgvingina (sí leiðbeiningina til upptøku).
Um miðalprótvalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Fjølbroyttir møguleikar verða at arbeiða við menning og læring, har nýggj vitan støðugt skapar spennandi avbjóðingar. Í lærarayrkinum arbeiðir tú saman við børnum og ungum á ymsum fakøkjum.
BEd-prógvið gevur atgongd til master- og kandidatútbúgvingar á námsfrøðiliga og didaktiska økinum.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Paulinu Poulsen, lestrarvegleiðara, paulinap@setur.fo, ella við at venda sær til Lydiu Didriksen, útbúgvingarleiðara, lydiad@setur.fo

Lestrartíð: 4 ár (240 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 35
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BEd sum námsfrøðingur

Hendan útbúgvingin gevur førleikar til at virka sum námsfrøðingur á barnaansingar-, frítíðar- og serøkinum

Tey lesandi skulu læra at virka og samstarva um heildarmenning av menniskjanum.
Á grundskeiðunum verður dentur lagdur á vísindaligan, námsfrøðiligan, sálarfrøðiligan og almenndidaktiskan førleika, sum saman við kunnleika um sosialisering gevur eina grundleggjandi fatan av námsfrøðiliga arbeiðinum.
Á linjulestrinum skal tann lesandi nema sær fakliga, námsfrøðiliga og didaktiska servitan og førleika at skipa fyri námsfrøðiligum virksemi á høgum stigi á dag- og serstovnum.
Tá linjulestur er í 3. og 4. lestrarárinum, kann partur av lestrinum lesast uttanlands.
Partur av útbúgvingartíðini er skipaður sum starvslæra á námsfrøðiligum stovnum.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv.
Um miðalprótalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Sum námsfrøðingur kanst tú arbeiða í vøggustovu, barnagarði, frítíðarskúla, ungdómshúsi og nógvastaðni á serøkinum.
BEd-prógvið gevur atgongd til master- og kandidatútbúgvingar innan námsfrøðiliga og didaktiska økið.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Paulinu Poulsen, lestrarvegleiðara, paulinap@setur.fo, ella við at venda sær til Anniku Antoniussen, útbúgvingarleiðara, annikaa@setur.fo

Lestrartíð: 4 ár (240 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 35
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BEd ískoytisútbúgving

Útbúgvingin gevur teimum við eldri lærara- ella námsfrøðingaútbúgvingum møguleika at søkja upptøku til framhaldslestur á masterstigi á námsfrøðiliga økinum

Ískoytisútbúgvingin skal geva fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum, sum eru útbúnir eftir eldri skipanum, ástøðiligan og verkligan førleika og kunnleika til vísindalig ástøði og háttaløg og harvið uppstiga teirra útbúgvingar til bachelor.
Ískoytisútbúgvingin er parttíðarlestur og snýr seg um vísindaástøði, akademisk háttaløg og skriving av BEd-ritgerð. Útbúgvingin leggur seg eftir at knýta akademiskar førleikar at námsfrøðiligu útbúgvingunum, sum tey lesandi hava frammanundan. Námsfrøðingar og fólkaskúlalærarar lesa saman og samstarva tvørtur um starvsøki.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er antin lærara- ella námsfrøðingaprógv.

Framtíðarmøguleikar
Við ískoytisprógvi til BEd ber til at søkja um atgongd til MEd-lestur, umframt onnur nám á masterstigi bæði á Fróðskaparsetri Føroya og á universitetum uttanlands.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Paulinu Poulsen, lestrarvegleiðara, paulinap@setur.fo

Lestrartíð: 1 ár (30 ECTS)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 15-20
Gevur rætt til stuðul: Nei

Lesið meira um útbúgvingina *her.*

Kunningartiltak i Kongshall
tysdagin 21. august 2018

Tað ræður um ongantíð at gevast at spyrja. Forvitni hevur sínar egnu grundir

– Albert Einstein

Hans Pauli Joensen er dekanur á Náttúruvísindadeildini

BSc í KT-verkfrøði

Hendan útbúgvingin gevur tær hópin av spennandi møguleikum at virka sum KT-verkfrøðingur

Høvuðsdenturin í útbúgvingini er lagdur á bygnað, nýtslu og forritan av KT-skipanum, umframt KT-verkætlanarleiðsla av tekniskum, fyrisitingarligum ella handilsligum telduskipanum. Dentur verður lagdur á KT-evni, sum geva góðar vinnumøguleikar í føroyskari og altjóða KT-vinnu og samfelagsfyrisiting, t.d. app-forritan. Frá 2020 verður undirvíst í forritanarmálunum Python og Java, umframt øðrum málum til web-skipanir (HTML/CSS/JavaScript/PHP/.NET MVC C#/SQL), dátuvísindi og vitlíki (R/Python). Góðir førleikar í enskum, føroyskum og skandinaviskum máli eru neyðugir. Frá 2020 verða eini 10% (2-3 skeið) av útbúgvingini skipað sum fjarlestur frá Mittuniversitetinum í Svøríki við enskum og svenskum máli. Fjarlesturskeið hava vanliga eisini stuðulsundirvísing í Føroyum.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði á B- ella A-stigi. Miðaltalið í nevndu lærugrein skal vera í minsta lagi 4 á B-stigi ella minst 2 á A-stigi eftir 7-talsstiganum. Hetta svarar til í minsta lagi 7 á B-stigi ella minst 6 á A-stigi eftir 13-talsstiganum.
Um miðalprógvtalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Sum KT-verkfrøðingur fært tú fjølbroyttar møguleikar at arbeiða við:

- KT-menning, forritan og verkætlanarleiðslu;
- KT-rakstri og –trygd;
- heimasíðuskipanum, spølum, lýsingum og appum
- undirvísing í KT, menning og rakstri av undirvísingaramboðum;
- gransking og ráðgevandi verkfrøði, dátuinnsavning og -viðgerð, teldusimulering.

BSc í KT-verkfrøði gevur atgongd til master-útbugvingar á fleiri universitetum uttanlands.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Hannes Gislason, útbúgvingarleiðara, hannesg@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 30-40
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSc í lívfrøði

Hendan útbúgvingin gevur tær fjøltáttaðar starvsmøguleikar í privatu vinnuni, eins og í almennari fyrisiting, gransking og undirvísing

Her leggja vit dent á føroyska lívfrøði við sínum mongu áhugaverdu og serstøku fyribrigdum. Tú lærir um plantur og djór, um hvussu hesi liva og hava tillagað seg umhvørvið. Eisini verður hugt at, hvussu plantur og djór verða ávirkað av menniskjum t.d. við dálking, veðurlagsbroytingum og fiskiskapi. Føroyska náttúran verður rannsakað bæði á sjógvi og landi, og hetta eru sostatt viðurskifti, sum tú bara kanst læra um á okkara Setri.
Fleiri skeið eru løgd soleiðis til rættis, at tú skiftir ímillum ástøði, starvsstovuvenjingar og at fara út í náttúruna.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði á B-stigi. Miðaltalið í hvørjari av nevndu lærugreinum skal vera í minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum ella 7 eftir 13-talsstiganum. Miðaltalið verður roknað av skrivligum og munnligum prógvtalsúrslitum og av endaligum ársmetum.
Um miðalprógvtalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Við hesi útbúgvingini fært tú møguleika at arbeiða í tí almenna ella tí privata, í alivinnu, í fyrisiting, á granskingarstovnum, í ráðgevingarfyritøkum og í undirvísing.
Sum BSc í lívfrøði hevur tú eitt gott fakligt grundarlag til framhaldslestur á masterstigi uttanlands.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella til Jónrit Halling, útbúgvingarleiðara, jonrith@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 12
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSc í mýlalívsvísindum

Við hesi útbúgvingini fært tú góðar førleikar at arbeiða í sjúkrahúsverkinum, á granskingarstovnum, við undirvísing ella sum vísindajournalistur

Her fært tú holla vitan um lívfrøði, men við høvuðsdenti á mýlalívsvísindi. Tú lærir um, hvussu mýl, so sum DNA, RNA og protein virka og samstarva í kyknum, og hvussu kyknur virka og samstarva í organismum.
T.d. verður hugt at, hvussu broytingar í DNA kunnu hava ílegutongdar sjúkur við sær. Eisini verður undirvíst í, hvussu bakteriur virka og ávirka okkum, bæði jaligt og neiligt.
Fleiri skeið eru løgd soleiðis til rættis, at tú skiftir ímillum ástøði, starvsstovuvenjingar og at fara út í náttúruna.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði á B-stigi. Miðaltalið í hvørjari av nevndu lærugreinum skal vera í minsta lagi 4 eftir 7-talsstiganum ella 7 eftir 13-talsstiganum. Miðaltalið verður roknað av skrivligum og munnligum prógvtalsúrslitum og av endaligum ársmetum.
Um miðalprógvtalið ikki nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Útbúgvingin gevur fjøltáttaðar starvsmøguleikar í almennari fyrisiting og privatum fyritøkum, so sum í sjúkrahúsverkinum, á granskingarstovnum, sum vísindajournalistur og í undirvísing.
Sum BSc í mýlalívsvísindum hevur tú eitt gott fakligt grundarlag til framhaldslestur á masterstigi uttanlands.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda tær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Jónrit Halling, útbúgvingarleiðara, jonrith@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 12
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSc í maskinfrøði

Upptøka verður í 2021

Her lærir tú um støddfrøði, náttúruvísindi og tøknifrøði á bachelorstigi við grund í tíni útbúgving sum maskinmeistari

Dentur verður lagdur á lærugreinar í verkfrøði, sum maskinmeistarin ikki longu hevur havt. Serliga er talan um støddfrøði fyri verkfrøðingar (½ árs lestur), sum er í samstarvi við Danmarks Tekniske Universitet. Kravdar lærugreinar eru eisini stýriverkfrøði, evnafrøði og forritan. Harafturat kann tann lesandi velja 2 ella 3 lærugreinar eftir áhuga, t.d. elveiting 1-2, styrkilæra 1-2, vindorka ella orka & inniklima.
Lesturin endar við bachelorritgerð, sum í minsta lagi svarar til ¼ ársverk.

Upptøkutreytir
Upptøkutreytin er at hava staðið maskinmeistaraprógv eftir kunngerð nr. 106 frá 15. september 2005. Støddfrøði 3 ella Støddfrøði A skal vera staðin við í minsta lagi 8 eftir 13-talsstiganum ella 4 eftir 7-talsstiganum. Maskinmeistarar, útbúnir eftir kunngerð nr. 129 frá 14. september 1992, kunnu vera tiknir upp, um kunnleikin í støddfrøði er nóg góður, t.d. um teir hava staðið støddfrøði A á miðnámi ella hava í minsta lagi 9 í miðal eftir 13-talsstiganum.

Aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Við hesi útbúgvingini fært tú møguleika at arbeiða við verkfrøði, ráðgeving og fyrisiting hjá privatum og almennum virkjum og stovnum.
Eftir at hava tikið hesa útbúgvingina er møguleiki at útbúgva seg víðari á øðrum universitetum kring heimin, t.d. til cand.polyt. á Danmarks Tekniske Universitet.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Benadikt Joensen, útbúgvingarleiðara, benadiktj@setur.fo

Lestrartíð: 1¼ ár / 2½ ár (75 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 10
Gevur rætt til stuðul: Ja (1¼ ár) / nei (2½ ár)

Lesið meira um útbúgvingina her

BSc í orkuverkfrøði

Upptøka verður í 2021

Her fáa tey lesandi vitan um og praktiskar førleikar í burðardyggari orkuveiting, burðardyggari orkunýtslu og um stóra týdningin, ið hetta hevur fyri umhvørvi og samfelag

Útbúgvingin gevur góðar førleikar í náttúruvísindum og elfrøði, umframt at tað verður arbeitt við at skilja og loysa avbjóðingar á orkuøkinum.
Studentarnir fáa holla vitan um burðardygga orkuveiting og orkunýtslu, og starvsvenjing í hálvt ár er løgd inn í útbúgvingina fyri at tryggja, at lesandi eru klár til arbeiðsmarknaðin eftir lokið prógv.
Vit viðgera, hvussu vit kunnu minka um ta orku, vit brúka, um bjálving og endurvinning. Og á hvønn hátt vit nøkta tann lutfalsliga vaksandi elorkutørvin, hvaðani orkan skal koma, og hvussu hon kann goymast.
Fyri tey, sum vilja vera við til at loysa slíkar avbjóðingar og fáa møguleika at lesa víðari uttanlands, er hetta ein góður útbúgvingarmøguleiki.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi. Miðaltalið í støddfrøði skal vera í minsta lagi 6 eftir 7-stiganum ella 8 eftir 13-stiganum. Eisini verða maskinmeistaraprógv góðtikin, um miðalprógvtalið er í minsta lagi 7 eftir 7-stiganum ella 9 eftir 13-stiganum.
Um miðalprógvtalið ikki nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Við hesi útbúgvingini fært tú møguleika at arbeiða við verkfrøði, ráðgeving og fyrisiting hjá privatum og almennum virkjum og stovnum.
Eftir at hava tikið hesa útbúgvingina hevur tú møguleika at útbúgva teg víðari á øðrum universitetum uttanlands.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda tær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Benadikt Joensen, útbúgvingarleiðara, benadiktj@setur.fo

Lestrartíð: 3½ ár (210 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSc í orkuvísindum og støddfrøði

Upptøka verður í 2021

Við hesi útbúgvingini fært tú møguleikar at arbeiða við verkfrøði, ráðgeving og fyrisiting, og so fært tú eisini hollan grundvøll til víðari lestur uttanlands

Útbúgvingin gevur góðar førleikar í alis- og orkuvísindum við atliti at m.a. burðardyggari og umhvørvisvinarligari veiting av orku, og hon leggur serligan dent á støddfrøði og letur tí upp fyri øðrum møguleikum eisini.
Fyri samfelag okkara er tað ein serstøk avbjóðing, at samband ikki er til aðrar orkuveitarar, og tí er týdningarmikið at fáa eina burðardygga lokala loysn, so Føroyar í mestan mun kunnu verða sjálvbjargnar við orku.
Hevur tú hug at loysa slíkar avbjóðingar á orkuøkinum, hava møguleika at lesa víðari uttanlands ella sleppa at undirvísa í støddfrøði á miðnámsskúlum, so er hetta ein lestrarleið fyri teg.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur bókligt miðnámsprógv (t.e. gymnasialt) við støddfrøði á A-stigi við í minsta lagi 8 eftir 13-talsstiganum ella minst 6 eftir 7-talsstiganum, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi. Ella um umsøkjari hevur staðið maskinmeistaraprógv við í minsta lagi 9 í miðal eftir 13-talsstiganum ella í minsta lagi 7 eftir 7-talsstiganum.

Hjá teimum, ið søkja gjøgnum kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Tú kanst arbeiða við verkfrøði, ráðgeving og fyrisiting hjá privatum og almennum virkjum og stovnum. Útbúgvingin gevur vitan um og førleikar í burðardyggari orkuveiting og orkunýtslu, umframt fakligan førleika at undirvísa í støddfrøði. Møguleikarnir til víðari lestur í støddfrøði eru góðir og til at arbeiða við náttúruvísindum og tøkni.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Benadikt Joensen, útbúgvingarleiðara, benadiktj@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her.

BSc í orkuvísindum

Upptøka verður í 2021

Her fært tú vitan um burðardygga orku, og hvussu týdningarmikið hetta er fyri umhvørvi og samfelag. Tú kanst arbeiða við verkfrøði og ráðgeving ella lesa víðari

Útbúgvingin gevur góðar førleikar í støddd-, alis- og orkufrøði við atliti at m.a. burðardyggari og umhvørvisvinarligari veiting av orku. Útbúgvingin er løgd soleiðis til rættis, at tú eftir fyrsta árið eftir nærri avtalu um val av skeiðum kanst fáa munandi ávirkan á innihaldið í tíni útbúgving.
Føroyar hava fjølbroyttar náttúrugivnar møguleikar fyri at vinna orku úr varandi orkukeldum sum t.d. vatni, vindi, sól, sjóvarfalli og aldu. Fyri samfelag okkara er tað ein serstøk avbjóðing, at samband ikki er til aðrar orkuveitarar ígjøgnum eitt felags veitingarnet. Tí er týdningarmikið at fáa eina burðardygga lokala loysn, so Føroyar í mestan mun kunnu verða sjálvbjargnar við orku.
Hevur tú hug til at loysa slíkar avbjóðingar og hava møguleika at lesa víðari uttanlands, so er hetta ein útbúgving fyri teg.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi.
Miðaltalið í støddfrøði skal vera í minsta lagi 6 eftir 7-talsstiganum ella 8 eftir 13-talsstiganum.
Eisini verða maskinmeistaraprógv góðtikin, um miðalprógvtalið er í minsta lagi 7 eftir 7-talsstiganum ella 9 eftir 13-talsstiganum.
Um miðalprógvtalið ikki nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Tú fært arbeiðsmøguleikar á økjum, har tørvur er á verkfrøði, ráðgeving og fyrisiting hjá privatum og almennum virkjum og stovnum.
Eftir at hava tikið hesa útbúgvingina hevur tú møguleika at útbúgva teg víðari á øðrum universitetum kring heimin.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda tær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Benadikt Joensen, útbúgvingarleiðara, benadiktj@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

Hjánám í støddfrøði

Upptøka verður í 2021

Útbúgvingin gevur studentunum almennan kunnleika í støddfrøði við serligum denti á undirvísing í støddfrøði, grundarlag undir støddfrøði og nýtslu av støddfrøði

Í útbúgvingini lærir tú grundleggjandi analysu, lineera algebra, líkindarokning og hagfrøði, ið er grundarlag undir flestu útbúgvingum í verkfrøði, alisfrøði o.t. Men útbúgvingin fevnir víðari, so innlit eisini fæst í høvuðsøkini algebra, geometri og grundarlag undir støddfrøði. Dentur verður eisini lagdur á prógv, og farið verður ordiliga í dýpdina við analysu. Eitt hálvt ársverk eru valfrí skeið, ið brúka støddfrøði sum amboð.

Upptøkutreytir

Fyri at koma inn á hjánám í støddfrøði skal studenturin í minsta lagi hava lokið miðnámsprógv, har A-stig í støddfrøði er staðið. Aðrir førleikar kunnu eftir umsókn verða góðkendir; men tá skal søkjast eftir kvotu 2.

Framtíðarmøguleikar

Hjánám er ikki ein endalig útbúgving og heldur ikki ein fulltíðarútbúgving. Saman við høvuðsgrein í øðrum faki frá útbúgvingarstovni, ið loyvir tí, kann hjánám gerast partur av einum bachelor- ella masterprógvi.

Hjánám í støddfrøði kann brúkast sum grundarlag undir víðari lestri. Við hjánámi í støddfrøði og høvuðsgrein í øðrum faki eru møguleikar fyri at undirvísa í støddfrøði á miðnámi og at arbeiða hjá tí almenna ella privata.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Gunnar Restorff, útbúgvingarleiðara, gunnarr@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Nei

Lesið meira um útbúgvingina her

Hugsanir við ongari fyllu eru tómar, hugskygni við ongum hugtøkum er blint

– Immanuel Kant

Hans Andrias Sølvará er dekanur á Søgu- og samfelagsdeildini

BSc í búskaparfrøði og virkisfrøði

Við hesi útbúgvingini fært tú førleika til at virka sjálvstøðugt sum búskaparfrøðingur/virkisfrøðingur ella fara undir víðari lestur á kandidat- ella masterstigi

Tey bæði fyrstu árini eru støðisár, har tú fært hollar førleikar í búskaparfrøði og virkisfrøði, umframt støddfrøði og hagfrøði. Tú fært til dømis innlit í ástøði og praksis um:

- Strategi
- Fíggjarmarknaðir
- Búskaparvøkstur
- Búskaparsveiggj

Á triðja ári fært tú við valfakum og bachelor-uppgávu møguleika at leggja serstakan dent á antin búskaparfrøðilig evni, sum til dømis búskaparfrøði um tilfeingisvinnur, ella virkisfrøðilig evni, sum til dømis Corporate Social Responsibility og vinnurætt.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv við støddfrøði á B-stigi. Um miðalprótalið ikki er nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Útbúgvingin gevur tær fjøltáttaður starvsmøguleikar í almennari fyrisiting og í privatum fyritøkum.
Sum bachelor í búskaparfrøði og virkisfrøði hevur tú gott grundarlag fyri at lesa víðari á kandidat- ella masterstigi bæði í Føroyum og uttanlands.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda tær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Jóannes Jacobsen, útbúgvingarleiðara, joannesj@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 25
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSSc í politikki og umsiting

Tú fært fjølbroytta vitan um politisk og umsitingarlig viðurskifti við serligum denti á avbjóðingar, sum smátjóðir hava í okkara altjóðagjørda heimi. Útbúgvingin er fyri tey, sum hava áhuga fyri, hvussu politikkur verður skaptur, reguleraður og broyttur

Útbúgvingarnar á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum eru tvørvísindaligar, ið merkir, at arbeitt verður tvørtur um fakmørk, og at støði verður tikið í praktiskum søgu- og samfelagsligum viðurskiftum við stórum denti á spurdómsstýrda læring.
Tey lesandi ganga til nógvar fyrilestrar, men læra eisini sjálvstøðugt arbeiðslag, samstarv og kritiska støðutakan, ikki minst gjøgnum verkætlanararbeiði.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv.
Um miðalprógvtalið ikki nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Við hesi útbúgvingini ert tú væl búgvin til at arbeiða við politikki og umsiting, bæði í almenna og privata geiranum.

BSSc í politikki og umsiting gevur atgongd til framhaldandi lestur á masterstigi, ið m.a. gevur førleikar til hægri undirvísingar- ella granskingarstørv.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Christian Svabo Justinussen, útbúgvingarleiðara, jensj@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging

Tann lesandi fær fjølbroytta vitan um samfelagsvísindalig viður-skifti við serligum denti á avbjóðingar við samfelagsplanlegging, sum smátjóðir hava í altjóðagjørda heiminum. Her lærir tú um tær tilgongdir, sum skipa, broyta og menna samfelagsskipanir

Útbúgvingarnar á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum eru tvørvísindaligar, ið merkir, at arbeitt verður tvørtur um fakmørk, og at støði verður tikið í praktiskum søgu- og samfelagsligum viðurskiftum við stórum denti á spurdómsstýrda læring.
Tey lesandi ganga til nógvar fyrilestrar, men tey læra eisini sjálvstøðugt arbeiðslag, samstarv og kritiska støðutakan, ikki minst gjøgnum verkætlanararbeiði.

Upptøkutreytir
Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv.
Um miðalprógvtalið ikki nóg høgt, ber til at søkja um upptøku gjøgnum kvotu 2, har aðrar fortreytir á javnsettum kunnleikastigi kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar
Sosialvísindi og samfelagsplanlegging er lestur fyri tey, sum hava áhuga at arbeiða á almennum, alment gagnligum og privatum stovnum og feløgum, men gevur eisini førleikar til víðari lestur, ið m.a. gevur atgongd til hægri undirvísingar- ella granskingarstørv. Við BSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging ert tú væl búgvin bæði til arbeiðsmarknaðin og til víðari lestur á masterstigi.

Nærri kunning
Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Firouz Gaini, útbúgvingarleiðara, firouzg@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

BA í søgu (smátjóðir og altjóðagerð)

Fyri at skilja samtíðina, mugu vit kenna okkara fortíð. Hetta er útbúgvingin fyri tey, sum vilja hava holla vitan um søguvísindaliga fakøkið og serkunnleika um føroyska søgu í altjóða høpi. Tú fært góðar førleikar til arbeiði bæði á almenna og privata marknaðinum

Við hesi útbúgvingini fær tann lesandi fjølbroytta vitan um og innlit í søgulig viðurskifti við serligum denti á avbjóðingarnar, sum smátjóðir hava í okkara støðugt meira altjóðagjørda heimi.
Bachelorútbúgvingin í søgu tekur trý ár. Nøkur skeið eru kravd, og nøkur ber til at velja eftir egnum áhuga. Tvey tey fyrstu árini eru støðisár, har lærugreinir í ávísan mun eru tær somu, sum lesandi í politikki og umsiting hava, eins og lesandi í sosialvísindum og samfelagsplanlegging. Talan er um tvørvísindaligan lestur, ið merkir, at støði verður tikið í praktiskum søgu- og samfelagsligum viðurskiftum við stórum denti á spurdómsstýrda læring. Undirvíst verður m.a. í søguvísindaligum arbeiðslagi, føroyskari søgu og alheimssøgu, altjóða politikki og moderniteti, í arkivkunnleika og í smátjóðum í danska ríkinum.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv. Verður søkt eftir kvotu 2, kunnu aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði góðtakast eftir nærri meting.

Framtíðarmøguleikar

Hetta er útbúvingin fyri tey, sum vilja arbeiða við avbjóðingum, sum smátjóðir hava, og hon gevur eisini nógvar aðrar førleikar, so sum til víðari lestur, sum gevur atgongd til hægri undirvísingar- ella granskingarstørv.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Erling Isholm, útbúgvingarleiðara, erlingi@setur.fo

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MSSc í politikki og umsiting

Hendan master-útbúgvingin gevur hollar førleikar at arbeiða við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum. Við MSSc í politikki og umsiting verður tú eisini væl fyri til víðari lestur á ph.d.-stigi

Útbúgvingin mennir evnini hjá lesandi at seta seg inn í kompleks viðurskifti, til kritiska støðutakan og sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði. Útbúgvingin leggur dent á, at lesandi menna førleikar at virka í smátjóðum og oyggjasamfeløgum. Her verður samfelagið sum skipan viðgjørt, eins og stovnar, teirra bygnaður, stýring og søguliga menning verða greinað. Lesandi fáa førleikar á altjóða stigi í vísindaligum ástøði og háttaløgum, men ogna sær samstundis sjálvstøðugan fakligan profil. Við støði í trupulleikagrundaðari, tvørvísindaligari tilgongd og starvslæru mennir tann lesandi eitt sjálvstøðugt arbeiðslag. Endað verður við master-ritgerð. Nakað av samskiftinum fer fram á enskum/skandinaviskum máli, eisini uppgávuskriving.
Kravið um at vera til staðar á lærustovninum er størri enn undir vanligum universitetslestri.

Upptøkutreytir

Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá Fróðskaparsetri Føroya.
Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá øðrum hægri lærustovni, har royndir við trupulleikagrundaðum og tvørvísindaligum arbeiði er ein fyrimunur.
Lesandi við øðrum førleikum, tó í minsta lagi á bachelorstigi, kunnu eisini søkja um upptøku.

Framtíðarmøguleikar

MSSc í politikki og umsiting er ein fakliga sterk samfelagsvísindalig útbúgving, grundað á vitan og royndir frá bæði altjóða viðurskiftum og úr føroyska samfelagnum. Hon gevur hollar førleikar at starvast við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum.
Við MSSc útbúgving í politikki og umsiting ert tú væl fyri til víðari lestur á ph.d.-stigi.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Eriku Anne Hayfield, útbúgvingarleiðara, erikah@setur.fo, tlf. 292597

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MA í søgu

MA í søgu gevur hollar førleikar at starvast við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum. Eisini verður tú væl fyri til víðari lestur á ph.d-stigi

Útbúgvingin er á høgum altjóða stigi og mennir evnini til kritiska støðutakan og til sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði. Dentur verður lagdur á, at lesandi menna førleikarnar at virka í smátjóðum og oyggjasamfeløgum. MA í søgu fevnir um menniskjans samspæl við søguligar og samfelagsligar treytir, og hvussu hetta knýtir saman fortíð og samtíð, so vit kunnu skilja søguligar samanhangir og egna samtíð.
Við støði í trupulleikagrundaðari, tvørvísindaligari tilgongd og starvslæru mennir tann lesandi sjálvstøðugt arbeiðslag. Endað verður við master-ritgerð.
Nakað av samskiftinum fer fram á enskum/skandinaviskum máli, eisini uppgávuskriving. Kravið um at vera til staðar á lærustovninum er størri enn undir vanligum universitetslestri

Upptøkutreytir

Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá Fróðskaparsetri Føroya.

Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá øðrum hægri lærustovni, har royndir við trupulleikagrundaðum og tvørvísindaligum arbeiði er ein fyrimunur.
Lesandi við øðrum førleikum, tó í minsta lagi á bachelorstigi, kunnu eisini søkja um upptøku.

Framtíðarmøguleikar

MA í søgu er ein fakliga sterk søguvísindalig útbúgving, grundað á vitan og royndir frá bæði altjóða viðurskiftum og úr føroyska samfelagnum. Hon gevur hollar førleikar at starvast við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum. Við MA-útbúgving í søgu ert tú væl fyri til víðari lestur á ph.d.-stigi.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, kirstinr@setur.fo
ella Eriku Anne Hayfield, útbúgvingarleiðara, erikah@setur.fo tlf. 292597

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging

Við MSSc í sosialvísindum og samfelagsplanlegging fært tú førleikar at arbeiða við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum. Tú kanst eisini lesa víðari á ph.d.-stigi

Her kann tann lesandi ogna sær førleikar á høgum altjóða stigi í sosialvísindum og samfelagsplanlegging, og samstundis menna sín egna sjálvstøðuga fakliga profil. Útbúgvingin mennir evnini hjá lesandi at seta seg inn í samansett viðurskifti, til kritiska støðutakan og sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði. Útbúgvingin leggur dent á, at lesandi menna førleikar at virka í smátjóðum og oyggjasamfeløgum.
Útbúgvingin tekur menniskjans samanspæl við samfelagsins strukturar og stovnar til viðgerðar, og hvussu intentionel samfelagslig menning skapast, grundað í felags avgerðum og virðum. Við støði í trupulleikagrundaðari, tvørvísindaligari tilgongd og starvslæru, mennir tann lesandi sjálvstøðugt arbeiðslag.
Nakað av samskiftinum fer fram á enskum/skandinaviskum máli, eisini uppgávuskriving. Kravið um at vera til staðar á lærustovninum er størri enn undir vanligum universitetslestri.

Upptøkutreytir

Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá Fróðskaparsetri Føroya.
Bachelorútbúgving í søgu ella samfelagsvísindum frá øðrum hægri lærustovni, har royndir við trupulleikagrundaðum og tvørvísindaligum arbeiði er ein fyrimunur.
Lesandi við øðrum førleikum, tó í minsta lagi á bachelorstigi, kunnu eisini søkja um upptøku.

Framtíðarmøguleikar

Talan er um eina fakliga sterka samfelagsvísindaliga útbúgving, grundað á vitan og royndir frá bæði altjóða viðurskiftum og úr føroyska samfelagnum. Hon gevur hollar førleikar at starvast við leiðandi og greinandi uppgávum í tí privata, almenna og sjálvbodna geiranum.
Við MSSc-útbúgving í sosialvísindum og samfelagsplanlegging ert tú væl fyri til víðari lestur á ph.d.-stigi.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, kirstinr@setur.fo ella Eriku Anne Hayfield, útbúgvingarleiðara, erikah@setur.fo, tlf. 292597

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

Hjánám í samfelagsvísindum

Endamálið við útbúgvingini er m.a. at útbúgva tey lesandi til at verða lærarar í miðnámsskúlum

Her viðgera vit tann týdning, ið mentanarlig, búskaparlig og tøknilig menning hevur á samfelagsgongdina.
Hjánám í samfelagsvísindum gevur teimum lesandi fjølbroytta vitan um og innlit í føroysk og altjóða samfelagsvísindalig viðurskifti og háttaløg. Lesturin er settur saman av skeiðum í sosiologi, antropologi, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði og altjóða politikki, bæði í ástøði og praksis. Í tí háttalagsliga partinum fært tú skeið í samfelagsvísindaligum háttaløgum.
Hjánám í samfelagsvísindum krevur 60 ECTS á bachelorstigi og 30 ECTS á masterstigi.
Øll mugu hava vísindaástøði og háttalag (10 ECTS), annaðhvørt í sínum høvuðs- ella hjánámi.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv. Studentur, sum søkir inn á hjánámið í samfelagsvísindum, skal hava staðið ella vera innskrivaður til eitt høvuðsnám. Tað ber eisini til at vera innskrivaður á samansett bachelornám.

Framtíðarmøguleikar

Hjánám í samfelagsvísindum gevur saman við einum høvuðsnámi møguleika at arbeiða sum miðnámsskúlalærari, umframt at spennandi starvsmøguleikar verða atkomiligir, har kunnleiki til samfelagsvísindi og samfelagsvísindalig háttaløg er neyðugur, t.d. í fyrisiting, miðlum/samskifti og føroyskum og altjóða felagsskapum.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Firouz Gaini, útbúgvingarleiðara, firouzg@setur.fo

Lestrartíð: 1 ½ ár (90 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: 10
Gevur rætt til stuðul: Nei

Lesið meira um útbúgvingina her

BL í løgfrøði

Upptøka verður í 2021

Her fáa lesandi møguleika fyri at nema sær siðbundnu løgfrøðiligu útbúgvingina í Føroyum við tí fyri eyga at seta lóg og løgfrøði í føroyskt høpi. Við BL í løgfrøði lanst tú virka sum málsviðgeri, ella tú kanst fara undir hægri lestur í lóg

Útbúgvingin er m.a. býtt í dogmatisk, háttalagslig og kontekstualiserandi skeið.
Flestu dogmatisku skeið taka støði í føroyskari lóg ella lóg í grannalondunum.
Háttalagskeið miða móti almennari fatan av løgfrøðini og førleika at greina truplar løgfrøðiligar spurningar. Kontekstualiserandi skeið seta føroysku rættarstøðuna í høpi og geva fatan av, hvussu rættarstøða og -skipan eru treytað av politiskum, mentanarligum og søguligum kringumstøðum.
Útbúgvin skulu hava nomið sær hollan førleika og kunnleika til m.a. avtalurætt, endurgjaldsrætt, fyrisitingarrætt og familju- og arvarætt. Tey skulu eisini dyrka og menna háttalagsligar førleikar, serliga í greining, skrivligum samskifti og argumentatión, sum hava serligan týdning fyri løgfrøðingar, ið virka í lítlum samfelag.
At enda verður ritgerð gjørd.

Upptøkutreytir

Treyt fyri upptøku er bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsskúlaprógv. Harumframt skal umsøkjarin svara nøktandi upp á upptøkuroynd.

Framtíðarmøguleikar

Tann útbúni skal kunna taka við størvum sum málsviðgeri í almennari og privatari fyrisiting, har kravið er kunnleiki til løgfrøði og málsviðgerð. Tann útbúni skal við at taka yvirbygnað eisini kunna starvast sum løgfrøðingur í øllum siðbundnum størvum.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda sær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Bárð Larsen, útbúgvingarleiðara, bardurl@setur.fo, tlf. 292598.

Lestrartíð: 3 ár (180 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: upp til 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

MA í løgfrøði

Upptøka verður í 2021

Við hesi úbúgvingini verður tú løgfrøðingur á høgum stigi, og hevur tú bachelor í løgfrøði frammanundan, skalt tú eisini kunna virka sum advokatur og dómari. Gjørligt er somuleiðis at fara undir ph.d.-lestur í lóg

Tey útbúnu skulu fata og duga at greina lóg og løgfrøði við atliti at fyrisitingarlóg, lógkønari útgávu og lóg hjá smáum løgdømum í samveldisstøðu.
Flestu dogmatisku lærugreinarnar í útbúgvingini taka støði antin í føroyskari lóg ella við atliti at lóg, sum er viðkomandi fyri smá løgdømi í samveldisstøðu. Løgfrøðilig fatan og háttalag fevna um djúpa fatan og greining av løgfrøðiligum háttalagi, umframt at tann lesandi fær almennan akademiskan førleika, ið er tillagaður avbjóðingum í løgfrøðiligum høpi.
Valgreinar eru eisini. Tildømis heimspekiliga ella samfelagsvísindaliga litað skeið, ið kasta ljós á ávís løgfrøðilig evni.
MA-ritgerðin skal sýna løgfrøðiliga fatan á høgum stigi.

Upptøkutreytir

Studentarnir skulu frammanundan antin hava í minsta lagi bachelor í løgfrøði ella annan bachelor.
Hevur tann lesandi bachelor í øðrum enn í løgfrøði er krav, at viðkomandi gjøgnum útbúgvingina og/ella royndir hevur nomið sær nóg mikið av vitan innan løgfrøði. Hetta skal skjalprógvast.

Framtíðarmøguleikar

Útbúgvin skulu kunna taka við størvum í almennari og privatari fyrisiting, har kravið er løgfrøði ella samsvarandi hægri útbúgving. Hava tey bachelor í løgfrøði frammanundan, skulu tey eisini kunna virka sum advokatar og dómarar. Løgfrøðingar við hesi útbúgving hava førleika at fara undir ph.d.-lestur í lóg ella samsvarandi.

Nærri kunning

Nærri kunning fæst við at venda tær til Kirstin Sigurðsdóttir Rasmussen, lestrarvegleiðara, kirstinr@setur.fo ella Bárð Larsen, útbúgvingarleiðara, bardurl@setur.fo, tlf. 292598.

Lestrartíð: 2 ár (120 ects)
Tal av lesandi, ið verða tikin upp: upp til 20
Gevur rætt til stuðul: Ja

Lesið meira um útbúgvingina her

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA